**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Deildarleiðarastarv í Tvøroyrar Skúla

Starvið sum deildarleiðari í Tvøroyrar Skúla verður lýst til setanar frá **1. august 2002.**

Skúlaárið 2002/2003 verða 300 næmingar í 10 árgangum í skúlanum.
27 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir deildarleiðara, sum**
- undir ábyrgd skúlastjórans skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal deildarleiðarin**
- saman við skúla-/ varaskúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúla-/ varaskúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum í Suðuroyar skúladømi I við fyribils tænastu í Tvøroyrar skúla og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 27.3 – 31.2 ella sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal verða Mentamálastýrinum í hendi **í seinasta lagi 6. juni 2002.**

**Mentamálastýrið**
**Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279 • 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 • Fax 355055**
**e-postur: mms@mms.fo**

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

## Pedagogar og hjálparfólk til frítíðarskúlan í Eysturskúlanum

**Størvini**
eru tvey pedagogstørv, 30 tímar um vikuna og eitt avloysarastarv í 4 mánaðir, frá 5. august til 29. november 2002, fyri hjálparfólk í farloyvi, 20 tímar um vikuna. Annað pedagogstarvið er varaleiðarastarv.

**Stovnslýsing**
Á frítíðarskúlanum ganga 42 børn, og vit halda til í A-lonini í Eysturskúlanum.

**Tað er týdningarmikið**
at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum, og eitt gott samstarv millum foreldur og starvsfólk.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

**Vit leggja stóran dent á**
at vit eru eitt frítíðartilboð til børnini. Vit eru saman við børnunum í teirra frítíð. Vit vilja menna børnini við at lurta, práta og vera saman við teimum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 5. august 2002, løn sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkaði størv.

**Meiri fæst at vita um størvini**
við at venda sær til: Barbaru Dahl, leiðara tlf. 314879 ella Katrina Petersen, samskipara tlf. 315160

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndum skulu vera frítíðarskúlanum í hendi seinast 21 mai. 2002 Setanarsamrøður verða skjótast gjørligt eftir hetta.

S N A R S K I V A N


## Brúktur Fiat Scudo
Sær út sum nýggjur




Fiat Scudo 1,9 Turbo diesel
Árg. sept. 97 Km. 37.800 Kr. 118.000,- + MVG
útgjald 31.000,-
serv. stýring, sentr. lás, tón. rútar v.m.
Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

## Brúktur BMW 523i
bilurin er í sera góðum standi



BMW 523i
Árg. 03/96 km.108.00 kr. 280.000,-
Bilurin er í sera góðum standi.
Bilurin hevur nógva orginala eykaútgerð, so sum Anti spin, klima aut., 6xcd boks, fjarst. sentrallás, sleipi krók, tví deilt setur aftan, ski posa, alu felgur og eyka sett av felgum v/dekkum v.m.
(eyka útgerð fyri ca. 75.000,-)
Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

**Almannastovan**
Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 3096
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

## Kunngerð
**um**
**hægstu dagpeningaupphædd**

Við heimild í § 9, stk. 2 í »Løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m.« (dagpeningalógin), ger Almannastovan kunnugt:

**§ 1.**
Hægsta dagpeningaupphædd er ásett til kr. 3.304,00 um vikuna íroknað frítíðarløn.

**§ 2.**
Henda kunngerð fær gildi frá 1. mai 2002.

**Almannastovan**
*hin 1. mai 2002*

Petra J. Joensen (sign.)
*Almannastjóri*

Anne Djurhuus (sign.)
*Deildarleiðari*




# GER KVETTIÐ!
**Fyrstafloks seyðahegn**
**50 m X 90 cm**
**6 tráða**

Yvir og undirtráður 3mm
Millumtráður 2,5mm
Meskavídd
B. 15cm H. 14cm til H. 22cm
Galvanisering 240 g/m²

**Einans kr. 375,-**

Fa. H.J. Michelsen
tlf. 314414 - 263707


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3348
Navn: Sp/f Hallbera Ólavsdóttir Kristiansen
Adressa: 513 Syðrugøta
Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 17.04.2002
Viðtøkudato: 17.04.2002
Kapitalur: Kr. 103.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 103.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Hallbera Ólavsdóttir Kristiansen, 513 Syðrugøta.
Stjórn: Hallbera Ólavsdóttir Kristiansen, 513 Syðrugøta.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka framleiðslu, handil og annars annað starv í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 13. mai 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3355
Navn: Sp/f 2/5-2002
Adressa: Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 02.05.2002
Viðtøkudato: 02.05.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Olaf Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn og Johan Hansen, Millum Gilja 42, 188 Hoyvík.
Stjórn: Olaf Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn og Johan Hansen, Millum Gilja 42, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjórunum í felag.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.11. - 31.10
Fyrsta roknskaparár: 02.05.2002 - 31.10.2003
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fiskibát, og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 13. mai 2002

Kristin Balle

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Ruskinnsavnari til IRF í Sandoy

Søkt verður eftir einum ruskinnsavnara til IRF í Sandoy, at byrja mánadagin 1. juli 2002.

**Arbeiðið umfatar:**
1. Innsavnan av øllum burturkasti frá húsarhaldum, bingjuplássum, virkjum og handlum v.m. í oynni.
2. Rakstur og umsiting fyri IRF av bingjuplássunum í oynni.
3. Rakstur og umsiting av bingjum v.m. hjá IRF í oynni.
4. Rakstur og umsiting av tyrvingarplássinum í oynni.
5. Umframt annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

**Krøv til umsøkjararnar:**
6. Stóra koyrikortið, og vanur at koyra lastbil og brøyt.
7. Kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Lønin verður sett eftir avtalu millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðið verður skipað av leiðaranum fyri Meginøkið.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan mánadagin 27. mai 2002 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF, tlf. 443343, Jógvan Júst Olsen.

IRF
Postboks 39
520 Leirvík

## Vestmanna skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2002/2003 fyri lærarar í farloyvi, lækkað tímatal, ráðgeving og skúlavegleiðing; fulltíðarstørv og parttíðarstarv.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 424105 ella 424264, ella frá Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 29. mai 2002.

**Vestmanna Skúlastýri**
v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Haldórsvíkar Sóknar Arbeiðarafelag verður í Avhaldshúsinum mikukvøldið 22. mai kl. 20.00.

Dagsskrá eftir lógum felagsins.
Lógarbroyting.

**Nevndin**

**Gøtu Kommuna**

## Gøtu skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/03.

Starvið er lýst leyst vegna økta tímakvotu.

Starvið er fulltíðarstarv, 26,5 tímar um vikuna.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 18.1. til 27.4.

Umsóknarfreistin er úti 23. mai kl. 16.00.

Um nærri upplýsingar ynskjast um starvið, ber til at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 441059.

**Gøtu Skúlastýri**
**v/ Mariu Gregersen, 513 Syðrugøta**

## Lærarastørv við Tofta skúla

Vegna farloyvir, verður søkt eftir 3 lærarum til Tofta skúla. Størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/2003.

Størvini eru til fulla tímatalvu.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 1. juni 2002.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

## Skrivstovuhøli til leigu

Við hesum verða skrivstovuhøli á adressuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn lýst til leigu. Talan er um nýmótans nýinnrættaði høli og fatar leigumálið um skrivstovuhølir við atgongd til felags fundarhøli, køk, toilet. Leigumálið er 134 m² til víddar og liggur sera væl fyri.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til Advokatfelagið og spyrja eftir Jógvan E. Ellefsen ella Petur Even Djurhuus.

Tórmóður Djurhuus, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 • 100 Tórshavn
tlf. 311260 • fax 311261
e–mail: advokatfelagid@kallnet.fo